

ÓLI JACOBSEN
olij@sosialurin.fo






**Næstu ferð:**

Næsta frásøgnin úr gamla kirkjugarði er um grøvina hjá Jørgen Frants Jacobsen, okkara kenda rithvøvund og pápa hansara Meinhardt. Mamman Jørgen Frants, Marin, lat Jørgen Frants fáa sína grøv og hevur hetta sína søgu.

# Angelica misti mann og einastu dóttir

Angelica er ein av teimum mongu hørðu lagnunum í gamla kirkjugarði. Hon var systir Jógvan Simonsen, sum var ein teirra, sum slóðaði fyri føroyskari sjóvinnu. Foreldrini hjá henni vóru Símun Joensen av Glyvrum, búsitandi uttan fyri Garðar í Hoyvík og Charlotta Amalia Reinert úr Kaldbak.

Angelica giftist við Tummas Paula Jacobsen í Klokkarastovu, men teimum untist bert tvey ár at liva saman. Angelica var jarðamóðir í Havn í mong ár. Hon var ein av teimum, sum vórðu sendar niður til Danmarkar at nema kunnleika, so tær kundu átaka sær starv sum jarðamóður. Angelica var jarðamóður í Suðurstreymoy í mong ár. Tey, sum mintust hana sum eina gamla konu, siga, at hon var avhildin, og øll vóru góð við gomlu jarðamóðir.

Tað man mangan hava verið ófýsið hjá henni á vetrardegi at fara til Syðradals, Norðradals, Kirkjubøar og aðrastaðni í jarðamóðurørindum. Tá ið hon var væl til árs og kropsevnini vóru við at ganga undan, kom tað fleiri ferðir fyri, at hon var borin um fjøllini, tá ið líkindini vóru av teimum vánaligastu. Í 1878, tá ið hon hevði sitið einkja í fleri ár, lat hon byggja eini hús uppi við Tinghúsvegin. Hon búði í teimum til hon doyði í 1918.

Hesi húsini gjørdust støð hjá hoyvíkingum, tá ið teir komu til Havnar. Hetta var serliga galdandi, tá ið farast skuldi í kirkju. Ættfólkini úr Hoyvík gingu inn til hennara at skifta úr oljuklæðum/roðklæðum um vátveður var, áðrenn farið varð í kirkju.

Dóttir Angelicu og Klokkara Tummas, Anna Sofía, giftist við Hans Jákup Michelsen, undir Ryggi í Havn. Men eisini teimum untist stutt samlív. Longu 20 ára gomul doyði hon. Tá ið hon hevði fingið dótrina Fíu, legðist hon í songina av bróstsjúku og doyði stutt eftir. Hans Jákup varð búgvandi hjá vermammuni við dótrini í 10 ár, hóast hann hevði bygt í C Pløeynsgøtu. Tá giftist hann upp aftur. Men dóttir Hans Jákup og Onnu Sofíu varð



*Anna Sofía hjá Angelicu, sum doyði longu 20 ára gomul.*

verandi hjá ommuni, til hon sum ung fór til Danmarkar at tæna. Her hitti hon ein onglending og fór til Onglands við honum og giftist. Hon fekk dóttur og son.

Tá ið Angelica doyði, var ommudóttirin Fía, sum hon hevði fostrað upp, einasti arvingur. Boð vóru send til Onglands at koma heim at gera skil á arvinum. Men ikki bar til at koma beinanvegin, tí at drongur hennara var hermaður undir krígnum, sum ikki var av. Var hon ikki gift, slapp hon ikki aftur til Onglands, um hon fór av landinum, so hon kom ikki fyrr enn í 1919. Alt var selt á uppboði. Kristian Guttesen keypti húsini, og eru tey enn í hansara ætt.

Fía doyði í Bournemouth fyrst í 60-unum.

**Innskriftin á gravsteininum**

ANGELICA JACOBSEN
FØDT SIMONSEN
* 22. OKTOBER 1837
† 6. NOVEMBER 1918

ANNE SOPHIE MIKKELSEN
FØDT JACOBSEN
* 22. DECEMBER 1867
† 1. JULI 1888

DU HAR VÆRET TRO OVER LIDT
JEG VIL SÆTTE DIG OVER MERE
GÅ IND TIL DIN HERRES GLÆDE

## Eisini hørð lagna hjá systrini

Beint við hjá Angelicu búði hálvsystir hennara Charlotta.

Hon var gift við Óla Vang Hansen úr Havn, men hann doyði eisini í bestu árum.

Óla Vang var útrógvin 30. januar 1888. Tað var av besta veðri henda dagin, og Johanna á Høgabóli visti at siga frá Poul Nikláa við Ryggjagarð í Nólsoy, at nólsoyingar eisini vóru á útróðri hendan dagin og fóru at landi, tá ið liðugt var at draga. Men Óli setti línuna aftur. Um kvøldið brast hann á við stormi og kavaroki, og eingin bátur kom aftur. Teir vóru sjey mans sum fórust.

Tað var ikki gamansleikur at sita so illa eftir, men Lotta fall ikki í fátt. Hon setti vevin upp og fór at veva fyri fólk. Soleiðis kundi hon halda húsinum uppi. Helvtina av bindingarmynstrunum, sum Hans Marius Debes gav út í bók, hevði hann fingið frá Lottu. Annars høvdu tey ikki verið til í dag.

Lotta átti trý børn. Lorenza doyði av tuberklum bert 20 ára gomul. Hon hevði gingið eitt ár á læraraskúla, tá ið hon fall frá. Synirnir vóru Símun, nendur Símun hjá Lottu og Christian Frederik, kallaður C. F.

Teir slitu báðir høgan aldur. Húsini hjá Lottu fóru fyri nøkrum árum síðani undir Bøkjarabrekku.

*Keldur:*
*N. J. Arge: Fólk í Havn*
*Sverri Joensen: Á Høgabóli.*



*Húsini hjá Angelicu.*



*Angelica saman við dótrini*



*Lotta og maðurin Óli Vang Hansen.*